


**Betri marknaðartilgongd til ES. Nýskipanaruppskotið setast í verk. Fleiri føroyingar á sendistovurnar hjá dønum uttanlands. Hesi eru millum evnini, sum Sambandsflokkurin vil virka fyri, um flokkurin kemur á Fólkating. Hósdagin legði Sambandsflokkurin sína valskrá fram.**

VALSKRÁ SAMBANDSFLOKSINS

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

# Ríkisfelagskapurin tryggjar framburð

Sambandsflokkurin leggur út sum eitt óløgi í valstríðnum til Fólkatingsvalið týsdagin 8.februar. Listin yvir valevni er longu klárur, og hósmorgunin legði flokkurin - sum fyrsti flokkursína valskrá fram.

Hóast stóri atkvøðuslúkurin frá seinasta fólkatingsvali, Lisbeth L. Petersen, ikki stillar upp hesaferð, letur flokkurin ongan iva verða um, at málið er at endurvinna fólkatingssessin, sum flokkurin hevur havt síðan 2001.

Ikki heilt óvæntað er ríkisfelagsskapurin snúningspunktið í valskránni hjá Sambandsflokkinum.

## Trý høvuðspunkt

Súlurnar í valskránni hjá Sambandsflokkinum til Fólkatingsvalið eru tríggjar í tali: Ríkisfelagsskapurin, vinnulívið og gransking. Formaður Sambandsfloksins segði á tíðindafundinum, at Sambandsflokkurin er framvegis einasti føroyski flokkur, sum beinleiðis berjist fyri ríkisfelagsskapinum.

Í valskránni sigur Sambandsflokkurin, at flokkurin vil nýta fólkatingssessin til at virka fyri, at Nýskipanaruppskotið hjá flokkinum verður sett í verk.

- Danmark, Grønland og Føroyar skulu roknast sum javnbjóðis partar í danska ríkinum. Øll málsøki, sum í dag eru felagsmál, skulu kunna yvirtakast sum føroysk sermál, um bara annar parturin ynskir tað. Tó skulu tey málsøkini, sum hava við ríkiseindina at gera ikki kunna yvirtakast. Hesi eru uttanríkismál, verjumál, rættarskipan, kongshús, grundlóg og gjaldoyar, stendur skrivað í valskrá Sambandsfloksins.

Kaj Leo Johannesen vísti á, at eitt vælvirkandi vinnulív er ein fortreyt fyri vælferð í Føroyum, og fólkatingssessurin skal nýtast til at geva vinnuni so góðar karmar sum gjørligt. Hetta skal millum annað gerast við at betra um marknaðaratgongdina til ES, har málið hjá Sambandsflokkinum er at gerast partur av teimum fýra frælsunum( Frítt at flyta vørur, tænastur, kapital og arbeiðsmegi um landamørkini, blðm)

Spurdur, hví Sambandsflokkurin ikki hevði virkað fyri betri marknaðartilgongd til ES á Fólkatingi seinastu fýra árini, svaraðu floksformaðurin og Lisbeth L. Petersen, at kjakið um ES fyrst og fremst mátti taka dik á seg í Føroyum, áðrenn málið kundi viðgerast á Fólkatingi.

Sambandsflokkurin ynskir eisini, at Føroyar gjøgnum donsku sendistovurnar fáa ein virknari uttanríkispolitiskan leiklut. Hetta skal millum annað tryggjast við, at Føroyar komandi árini í minsta lagi senda 15 føroyskar ungdómar á sendistovur hjá ríkinum úti í heimi.

Endamálið við hesum er geva føroyingum upplæring og royndir í altjóða samstarvi, sum teir bera við sær heim aftur til føroyska samfelagið, sum flokkurin málber seg í valskránni.

Seinasta súlan í valskránni er granskingin. Sambandsflokkurin heldur, at ríkisfelagsskapurin er ein týðandi liður í at raðfesta granskingina í Føroyum hægri.

Í valskránni vísir flokkurin á, at ríkisfelagskapurin tryggjar føroyingum góðar útbúgvingarmøguleikar, sum føroyingar ikki noyðast at rinda fyri sjálvir og fría atgongd til øll granskingarráðini í Danmark.

Flokkurin heldur, at ríkisfelagsskapuurin, vinnulívið og granskingin kunnu vera við til at skapa tann búskaparvøkstur, sum er neyðugur fyri Føroyar.

## Stuðlar Vinstra

Undir framløguni av valskránni lat formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, ongan iva vera um, at kemur Sambandsflokkurin á Fólkating ætlar flokkurin at stuðla Anders Fogh Rasmussen og flokkinum Vinstra.

Kaj Leo Johannesen legði kortini dent á, at Sambandsflokkurin hevði ongar ætlanir um at selja seg til Vinstra, men hinvegin virka fyri tí, sum tænir føroya fólki best, sum hann málbar seg.

### FAKTA: Fólkatingslimir Sambandsfloksins

1906-12 Olivur Effersøe
1912-15 Andreas Samuelsen
1918-39 Andreas Samuelsen
1939-43 Jóhan M. Fr. Poulsen
1950-64 Jóhan M. Fr. Poulsen
1977-87 Pauli Ellefsen *
1988-90 Pauli Ellefsen
1994-98 Edmund Joensen *
2001-05 Lisbeth L. Petersen

*: Jóhannes Martin Joensen sat á Fólkatingið fyri løgmenninar Paula Ellefsen og Edmund Joensen í árunum 1981-85 og 1994-98

### FAKTA: Valevnini hjá Sambandsflokkinum

- Helgi Abrahamsen, floksskrivari, Strendur
- Hans Arne Bertholdsen, maskinmeistari, Klaksvík
- Svenning Borg, sjómaður, Vágur
- Johan Dahl, løgtingsmaður, Vágur
- Marjus Dam, løgtingsmaður, Miðvágur
- Erikka Elttør, krambakvinna, Klaksvík
- Olav Enomoto, løgtingsmaður, Vestmanna
- Atli Hansen, stjóri, Norðragøta
- Edva Jacobsen, bankakvinna, Fuglafjørður
- John Kári Jacobsen, skipari, Hvannasund
- Edmund Joensen, løgtingsmaður, Oyrarbakki
- Betta Joensen, lærari, Klaksvík
- Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, Tórshavn
- Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Klaksvík
- Marja Lamhauge, verkfrøðingur, Lambareiði
- Høgni Mikkelsen, byggimeistari, Tórshavn
- Gunnar K. Nattestad, lesandi, Sandavágur
- Bárður Nielsen, landsstýrismaður, Vestmanna
- Alfred Olsen, løgtingsmaður, Saltnes
- Marjun Olsen, sjúkrahjálpari, Øravíkarlíð
- Beate L. Samuelsen, tíðindakvinna, Tórshavn
- Jaspur Vang, løgreglumaður, Tvøroyri
- Eyðna Vidtfeldt, lesandi, Tórshavn

### FAKTA: Topp 10 á Fólkatingsvalinum 2001

1) Lisbeth L. Petersen 2286
2) Edmund Joensen 955
3) Alfred Olsen 485
4) Kaj Leo Johannesen 319
5) Marjus Dam 225
6) Johan Dahl 169
7) Atli Hansen 147
8) Eivind Jacobsen 147
9) Jákup Lamhauge 133
10) Olav Enomoto 128